Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postboks 2039
110 Tórshavn

8. februar 2019

Okkara j.nr.
19/00531-2

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.
19/00023

**Viðv.: viðmerkingar til dagføring av Tolllógini**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum uppskoti til broytingar í tolllógini, ið er sent felagnum til hoyringar.

Fyrst av øllum skal felagið átala stuttu hoyringarfreistina. Hetta hevur viðført, at uppskotið ikki er viðgjørt í Stýrinum fyri Kommunufelagið. Málið verður viðgjørt á komandi stýrisfundi og tilskila vit okkum tí rættin at koma við ískoytisviðmerkingum eftir hetta.

Uppskotið hevur tó verið viðgjørt í netverki hjá Kommunufelagnum fyri havnaumsjónarmenn, og eru viðmerkingarnar frá Kommunufelagnum hesar:

Til § 1 nr. 8 (broyting í § 28 stk. 8):

Skotið verður upp, at *"Havnamyndugleikar og flogferðslumyndugleikar hava skyldu til at siga tollvaldinum frá ávikavist ófráboðaðum skipum og ófráboðaðum flogførum, sum koma til tolløkið. Havnamyndugleikar hava skyldu til at siga tollvaldinum frá, vera teir varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga."*

Í viðmerkingunum til uppskotið sæst, at *"Fyri at lætta um uppgávuna hjá TAKS at hava tolleftirlit, skjýtur Fíggjarmálaráðið upp, at tað verður álagt havnamyndugleikunum at boða tollvaldinum frá..."*

Kommunufelagið tekur ikki undir við, at tað verður áløgd havnamyndugleikunum ein fráboðanarskylda mótvegis tollvaldinum. Tolleftirlit er ein landsuppgáva. Prinsipielt kann Kommunufelagið undir ongum umstøðum góðtaka, at ein partur av eini landsuppgávu á henda hátt reelt verður skúgvað til kommunalar myndugleikar at útinna, enntá við eini so ósmædnari grundgeving, at hetta er fyri at lætta um uppgávuna hjá landsmyndugleikanum TAKS. Um TAKS hevur tørv á fleiri ressoursum til at útinna tolleftirlit, so eigur TAKS at fáa tað, teimum tørvar til at útinna hesa uppgávu.

Harnæst er uppskotið um, at havnarmyndugleikin skal hava skyldu til at siga tollvaldinum frá ófráboðaðum skipum, ikki nóg væl gjøgnumhugsað, tí hædd er ikki tikin fyri, hvat hetta kemur at merkja fyri havnamyndugleikarnar.

Kommunufelagið

Í praksis er ikki víst at havnamyndugleikin hevur fingið nakra fráboðan frá skipinum, og í fleiri havnum er ongin vakt á staðnum, partar av degnum. Tá skipið kemur, veit havnarmyndugleikin ikki um skipið hevur boðað tollmyndugleikanum frá, og merkir hetta væl, at ringjast skal til tollarin hvørja ferð eitt skip kemur, fyri at vera vísur í, at fráboðanarskyldan verður yvirhildin. Hetta fer sjálvsagt at krevja munandi fleiri ressousir av kommunalu havnamyndugleikunum.

Harnæst hevur havnamyndugleikin ongan møguleika at vita um vøran, verður upp- ella innskipað ólógliga. Skal havnamyndugleikin so biðja hvørt skip um prógv fyri, at vøran teir uppskipa, er fráboða tollmyndugleikanum? Slíkt arbeiði fellur uttanfyri tað, sum havnamyndugleikarnir hava sum uppgávu.

Tá tað nú sambært § 1 stk. nr. 8 í uppskotinum er ætlanin at áseta sum eitt krav, at skipini skulu hava ein føroyskan agent, metir Kommunufelagið, at rættast hevði verið at lagt fráboðanarskylduna á agentin, um skipið er útlendskt, ella beinleiðis á reiðaríið, um skipið er føroyskt. Hetta átti heldur ikki at verið ein praktiskur trupulleiki tá hugsað verður um talgildu menningina av samfelagnum og teknisku møguleikarnar hjá myndugleikum at hava digitalt eftirlit bæði við skipaferðslu og vøruinnflutningi.

Viðmerkjast skal til seinast, at sum nú er, hava havnamyndugleikin og tollmyndugleikin eitt gott ( hóast óformelt ) samstarv, har havnamyndugleikin boðar tollvaldinum frá, um teir halda at okkurt ivasamt fer fram. Hettar meta havnamyndugleikarnir er ein betri skipan, enn at áleggja havnunum fráboðanarskyldu.

Samanumtikið mótmælir Kommunufelagið, at fráboðanaskylda verður løgd á havnamyndugleikarnar, og verður í staðin mælt til at leggja fráboðanarskylduna á agentin ella reiðaríið.

Kommunufelagið hevur onki at viðmerkja til restina av uppskotinum.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**